# Scilly enn einaferð

**Mánadagin 28. apríl fara sjey kvinnur úr Føroyum niður á Scillyoyggjarnar at luttaka í heimsmeistarakappingini í Gig rógving. Kappingin er um vikuskiftið 3. og 4. mai**

KAPPRÓÐUR
*Solby A. Eliasen*



*Vikuskiftið 3. og 4. mai skal henda føroyska kvinnumanningin í eldin á Scilly oyggjunum, tá heimsmeistarakappingin í Gig rógving fer av bakkastokki*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tær hava vant dúgliga síðani í januar mánaði. Manningin á Brendan, sum er báturin føroysku rógvararnir, sum vinna sær luttøku í kappingini á Scilly, venja í. Tað vóru upprunaliga kvinnurnar á Jarnbardi, sum vunnu henda heiðurin í fjør, men av tí at onkur teirra er farin av landinum, so eru aðrar kvinnur við eisini. Tær eru frá Riddaranum og Páll Fanga, sum gjørdust ávíkavist nummar tvey og trý í heimligu kappingini hjá seksmannaførum við kvinnum í fjør.

Jannie Dam Jacobsen er róðurskvinna, og hetta er triðju ferð, at hon fer niður á Scilly at luttaka í hesi kappingini. Fyrstu ferð hon var við gjørdust tær nummar fimm og seinnu ferð nummar 13.

Jannie sigur, at tær hava vant harðari til hesuferð enn seinast tær vóru við. Men tað var so óheppið, at ein teirra fekk ein skaða fyri einum mánaði síðani. Hon brákaði eitt rivjabein og vandi ikki við teimum í fýra vikur. Hetta tíðarskeiðið var so ein eykamaður við fyri hana. Hon byrjaði aftur fyri umleið eini viku síðani, og Jannie fegnast fyrst og fremst um, at tær aftur eru fullmannaðar.

– Av øllum hesum hava vit valt ikki at trampa so nógv niður á venjingina, tí hon hevur ikki verið við okkum so longi, sigur Jannie.

Kvinnurnar fara úr Føroyum mánadagin og verða á St. Mary á Scilly týsdagin. Síðani hava tær fýra dagar, áðrenn sjálv kappingin byrjar.

**Rógva langt**

Kappingin er býtt upp í fýra róðrar. Tveir leygardag og tveir sunnudag. Tann fyrsti róðurin er ein innleiðandi, har giggirnar verða býttar upp í bólkar við 12 í hvørjum.

12 tær fyrstu verða so bólkur A, 12 tær næstu bólkur B og so framvegis. Tað eru yvir 70 giggir meldaðar til kappingina. Róð verður bæði hjá monnum og kvinnum. Og hetta er sambært heimasíðuni hjá Klaksvíkar Róðrarfelag fyrstu ferð, at tað eru fleiri giggir tilmeldaðar hjá kvinnum enn monnum.

Fyrsti teinurin er tann longsti. Hann er góðar 3.000 metrar. Síðani skulu tær rógva góðar 2.000 metrar hinar tríggjar róðrarnar. Og tá ræður um antin at halda seg so ovarliga í bólkunum sum til ber ella at rógva seg uppeftir. Tað vil siga, at um ein gig verður nummar 18 í tí innleiðandi róðrinum, so skal hon rógva tann næsta róðurin í bólki B. Verður hon millum tveir tær fremstu, so rykkir hon upp í A bólkin saman við eini aðrari, meðan tvær tær niðastu í bólki A rykkja niður í B. Og soleiðis gongur tað fyri seg allan vegin.

Jannie vónar, at tær fara at megna at vera í A bólkinum, tá tað avtornar. Tá er man millum 12 teir bestu giggirnar og má tað sigast at vera eitt gott úrslit.

– Tað er vónleyst at siga áðrenn, hvussu tað fer at gangast, men eg vóni, at vit klára at enda í A bólkinum. Tað er okkara mál, staðfestir Jannie Dam Jacobsen.

Tær hava lagt seg meira eftir at rógva Scilly mátan hesuferð, enn undanfarin ár. Scilly mátin er heilt øðrvísi enn tann føroyski, og Jannie vónar, at tað er tað rætta, tær hava valt at gera. Hon sigur tó, at tempoið hjá teimum framvegis er munandi hægri enn hjá teimum, sum rógva á Scilly, men alt hitt er farið at líkjast tí rætta meira og meira. Tíðirnar hjá teimum eru eisini batnaðar sera nógv, síðani tær byrjaðu, men spurningurin er, hvussu eftirfarandi tíðirnar í veruleikanum eru. Veður og sjógvur avger eisini tíðirnar harniðri. Men tað er ein sannroynd, at tá allar umleið 70 giggirnar leggja til brots niðri við St. Agnes til tann fyrsta róðurin, tá ræður um at vera millum tær fremstu á startlinjuni. Tí tað er sanniliga ikki ein bein startlinja, sum vit kenna hana her í Føroyum. Tað kann gott vera bátslongdir ímillum, og tað er sera trongt millum allar bátarnar. Onkuntíð kemur tað eisini fyri, at bátur vendur øvugtan veg, tá róðurin verður settur í gongd. Tað verður mett, at, av tí at teinurin er so langur, tær bestu giggirnar megna at rógva seg fram um hinar óansæð hvar og hvussu tær liggja í startinum.

Kvinnurnar rógva sum sagt 3. og 4. mai. Og longu mánadagin 5. mai gongur leiðin heimaftur. Tær verða aftur í Føroyum týsdagin 6. mai.

# Úr Jarnbardi í Kerens

**Hóast hetta eru triðju ferð, at Jannie Dam Jacobsen fer niður á Scilly oyggjarnar sum róðurskvinna, so fer hon hesuferð fyri fyrstu ferð í giggina, sum tær skulu nýta til kappingina**

KAPPRÓÐUR
*Solby A. Eliasen*



*Tað verður við Kerens, at kvinnurnar hjá Jarnbardi skulu royna seg, nú HM í gig-róðri stendur fyri framman*

Ein gig er ein heilt øðrvísi bátur enn tann føroyski. Tað er ongin ivi um tað. Men tað er eisini munur á teimum ymisku giggunum. Tá Jannie hevur verið á Scilly hesuferð, hevur hon sum helst tann einasta sitið í trimum ymiskum giggum. Fyrst er tað Brendan, sum RSF hevur fingið heim til manningarnar at venja í. Síðani er tað Sowenna, sum tær róðu í báðu ferðirnar tær hava verið harniðri. Sowenna er ein gomul gig, sum so at siga ikki verður nýtt longur. Tað er eitt lokalt felag á St. Mary, sum eigur hana. Men í fjør keypti Amerada Hess eina nýggja gig til felagið við tí treyt, at føroyingarnir kunnu nýta hana júst til hesa kappingina. Tað er nevniliga so, at tað eru nógvar, nógvar aðrar kappingar har um leiðir eisini, og tá nýta tey so ta nýggju gigina, sum eitur Kerens.

Jannie og hinar eru sera spentar at sleppa at royna ta nýggju giggina. Tær hava bert sæð hana á myndum, men av tí at ein av teimum var á Scilly og róði í fjør, so hava tær fingið frágreiðingar frá henni, um hvussu tann nýggja er.

Og har er okkurt sum Jannie stúrir eitt sindur fyri.

– Árarnar á Kerens eru heilt øðrvísi enn tær á bæði Brendan og Sowennu, so eg vóni ikki, at tað kemur at gera tann stóra munin, sigur róðurskvinnan á Kerens.

Av teimum sjey, sum fara niður á Scilly komandi mánadag, eru fýra, sum hava roynt tað áður, so vónirnar áttu at verið góðar til eitt rímuligt úrslit.

Men Jannie sigur sum minst, tá prátið fellur inn á tað.

– Vit skulu í eina aðra gig, og hana mugu vit síggja og royna fyrst, sigur hon at enda.

Sosialurin ynskir kvinnunum á Kerens góða eydnu í róðrunum á Scilly.



# Kyndil tók øll steypini

**Ikki bara hjá monnunum, men eisini í øllum dreingjadeildunum eydnaðist Kyndli at vinna steypakappingina í hondbólti**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Kyndil heldur fast um flottu steypatraditiónirnar hjá felagnum. Ikki bara eydnaðist tað besta mansliðnum at vinna Coca-Cola steypið, men eisini yngru dreingjadeildirnar gjørdu bart.

Her eydnaðist nevnliga Kyndli at vinna tey fýra steypini, sum kappast verður um, og eisini í aðrar mátar var talan um eitt framúr gott ár hjá Kyndli. Soleiðis vunnu dreingir 10, 14 og gullmerki, meðan dreingir 12, unglingarnir og fyrsta deild vunnu silvur. Merkisvert er annars í hesum, at í øllum teimum førum, har Kyndil ikki vann FM-kappingina, vóru tað strandingar, sum struku avstað við gullinum.



*Steypavinnarar í dreingir 12. Aftast f.v. Kári Nielsen, Mortan Johannesen, Andrias Sólsker, Holmar Høgni Jákupsson, Christian í Garði, Ári Olsen, Óli Arge, Árni Arge, Hallur Nielsen, Hjørtur Nolsøe, Dánjal Jákup Hansen, Thomas Juel Thomsen, Janus Mortensen, Chritsian Vilhelm Jacobsen og Teitur Nielsen*



*Dreingir 10 hjá Kyndli gjørdust greipuvinnarar. Standandi f.v. eru tað Jónsvein Joensen, Samson Helmsdal, Jógvan Nolsøe, Niels Juel Nolsøe, Rene Joensen, Sigurð Simonsen, Lotte Sørensen, Eirikur Simonsen, Tróndur Jensen, Høgni Klein Olsen, Bergur Joensen, Sverri Mortensen, frank Askildsen og Ivan Hofgaard*



*Eisini dreingir 14 gjørdu bart og vunnu greipuna. Hanus Joensen, Tummas Pauli Joensen, Høgni Simonsen, Andrias Poulsen, Pætur Johansen, Pætur Jørgensen, Rúni Johansen, Petur Martin Johansen, Jóhan Højgaard, Ásmund Poulsen, Trygvi Askham, Johan Ellingsgaard og John Hansen*



*Greipan kom eisini til høldar hjá dreingjum 16: Jónleif Sólsker, Sjúrður Simonsen, Hans Arni Thomsen, Hjalti Jacobsen, Sylvi Hansen, Rókur Nielsen, Brian Poulsen, Pól Andreassen, Bjørgvin Lenvig og Rani Ellingsgaard*



*Mansunglingarnir hava onga steypakapping, men Kyndil tók sær av FM-heitinum her. Dreingirnir eru standandi f.v. Rúni Mohr, Hans Arni Thomsen, Regin Fossabert, Hjalti Jacobsen, Poul Rói Mohr, Rókur Nielsen, Jónleif Sólsker, Teitur Simonsen, Hanus Johansen, Pól Andreassen, Rani Ellingsgaard og Bergur Midjord*

